

## Linda vigar 10 kilo ov nógv

Eg eti tí eg eri ólukkulig, sigur Linda Andrews um sína vekt. Linda er sambært veddingarfyritøkunum í Danmark stórfavorittur til at vinna X-Factor finaluna fríggjakvøldið, har hon skal dystast ímóti Alien Beat Club og Mohammed. Men hetta er ikki einasti dystur, ið Linda stríðist við. Av pallinum stríðist hon eisini fyri at sleppa av við tey eyka 10 kiloini. Hon er varug við, at hon vigar ov nógv – og hon veit eisini hvør orsøkin er til tað. - Eg eti, tí at eg elski ikki meg sjálva, sigur Linda í samrøðu við Ekstra Blaðið. Har sigur Linda, at hon berjist fyri at tapa seg, og at hon nú fær nógvan stuðul frá Lina Rafn, ið lærur hana at elska seg sjálva. Linda vigar í dag 73 kilo og er 164 cm long. Tað er umleið 10 kilo ov nógv heldur Linda, ið eisini sambært hennara BMI tali er í tyngra endanum.



*Zitouna hevur fult skonkiloyvi. Ætlanin er, at nýgjørda terassan í skal nýtast, tá veðrið er til vildar.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Traditionelt í miðbýnum

**Í dag letur matstova Zitouna upp á Lucas Debesargøtu í Havn. Talan er um siðbundnan mat, umframt a la carte matskrá og fult skonkiloyvi**

UPPLATING
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Erik Johansen letur í dag upp nýggja matstovu í Lucas Debesargøtu í Havn. Tað er í somu hølum, har Patio fyrr helt til í. Á matskránni eru léttir rættir í dagtímunum, og um kvøldið er a la carte við ymsum rættum, umframt eitt úrval av forréttum og dessertum. Matstovan, ið hevur fingið heitið Zitouna, hevur fult skonkiloyvi og kann skonkja og servera innan- og uttandura.

- Her verður eingin buffet og eingin pizzamatskrá. Men Carthage, sum Erik Johansen eigur og rekur, heldur fram við sínum virksemi, sigur dagligi leiðarin á Zitouna, Peter Hentze.

22 ára gamli kokkurin á Zitouna, eitur Jákup Sumberg. Hann er útbúgvin kokkur á Hotel Føroyum, og hevur starvast sum kokkur í Bowlinghøllini í Leirvík áðrenn hann byrjaði á Zitouna.

Dagliga fer Zitouna at hava opið millum klokkan 11.30-23.00. Køkurin stongir klokkan 22.00. Fríggjadag og leygardag verður opið nakað longri, til klokkan 01.00.

Peter Hentze sigur, at Zitouna er fyrst og fremst ein matstova. Men matstovan er eisini opin fyri gestum, ið ynskja ein kaffimunn ella eina øl, sum kann nýtast inni á matstovuni ella á terassuni í túninum.

Móttøka verður í dag millum klokkan 13.30-14.30, og klokkan 18.00 í kvøld letur matstovan fyri fyrstu ferð upp fyri almenninginum.



*Matstovan Zitouna letur upp í dag klokkan 18.00. Á matskránni er siðbundin matur í dagtímunum, og um kvøldið er matstovan ein a la carte matstova.*
*Frá vinstru: Peter Hentze, dagligur leiðar, Erik Johansen, eigari, og kokkurin, Jákup Sumberg*
*Mynd: Jens Kristian Vang*